# Poul bíðar eftir størstu avbjóðingini

**Teknikararnir kenna tað at vera stóra avbjóðing, tá ið teir í sambandi við Jessy Dixon konsertina skulu taka nýggja útgerð í nýtslu**



*- Størsta avbjóðingin hjá mær higartil í hesum høpinum var PETRA konsertin, sum fyri stuttum var í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, sigur Pól Nielsen, sum her sæst saman við Jóhan Andreas Hansen*

JESSY DIXON KONSERT
*Jóannes Hansen*

Mánakvøldið fer síðsta hond at verða løgd á tann partin av sangfyrireikingunum av Jessy Dixon konsertini, sum føroyingar hava ábyrgdina av. Osbjørn Berthelsen á Strondum og Eyðun á Lakjuni í Fuglafirði stjórna felagskórinum, sum hevur vant seinastu vikurnar, og síðsta venjingin verður mánakvøldið ella kvøldið undan, at konsertin verður. Ein partur av venjingini fer at vera í ítróttarhøllini í Runavík.

Týsdagin ella longsta dag fara Jessy Dixon og teir báðir tónleikararnir, sum hann fer at hava við til Føroya - ein klaverspælari og ein keyboardspælari - saman við føroysku tónleikarunum - guitar, trummur og bass - at pussa formin av, áðrenn konsertin verður í ítróttarhøllini í Runavík klokkan átta.

Ofta ella rættari altíð verður í sovornum førum fokus sett á sangarar og tónleikarar. Sjáldan verður gáað eftir teimum, sum syrgja fyri, at ljóð og ljós eru, sum tey eiga at vera.

Ein av teimum, sum ofta er í eldinum, tá ið stór tiltøk eru á skránni, er Poul Nielsen í Saltangará. Í mong ár hevur hann saman við onkrum vinmonnum havt ábyrgdina av ljóðinum á eitt nú konsertum og samfelagsfundum.

Poul skal týskvøldið hava ábyrgdina av teknikkinum saman við Jóannesi Steingrund, Jákupi Heinesen, Símuni J. Hansen, Jóhan Andreasi Hansen, Virgari Poulsen og Antoni Rasmussen. Teir skulu royna nýtt anlegg, sum kom til landið týsdagin í hesi vikuni.

– Størsta avbjóðingin hjá mær higartil í hesum høpinum var PETRA konsertin, sum fyri stuttum var í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Onkrir aðrir skuldu hava ábyrgdina av tí tøkniliga, men teimum barst frá, og so vóru tað ein vinmaður og eg, sum fingu uppgávuna saman við týska manegaranum hjá PETRA. Vit vóru spentir, og sjálvandi vóru vit fegnir, tá ið teir í PETRA søgdu seg vera væl nøgdar, sigur Poul Nielsen.

## Royndarferð

Konsertin við Jessy Dixon verður týskvøldið. Longu í kvøld sleppa Poul og vinmenninir í ítróttarhøllina at gera fyrstu fyrireikingarnar. Stórur pallur skal byggjast, og so skal nýggja anleggið setast upp og roynast.

– Vit hava ein felagsskap, sum sær tað sum sína uppgávu at veita hesa tænastuna í sambandi við tiltøk av hesum slagnum. Týsdagin í hesi vikuni fingu vit nýggja anleggið, sum er av Mackie slagnum. Talan er um komplett ljóð og ljósanlegg. Samlaða styrkin er umleið 15 túsund watt, og tað er einar 3-4 ferðir so nógv, sum vit frammanundan hava havt. Kostnaðurin liggur um hálvt annað hundrað túsund krónur. Í kvøld fara vit at seta útgerðina upp og royna hana, og vit fara ikki at gevast, fyrrenn vit hava fingið alt at rigga, sigur Poul Nielsen.

Tá ið vit spyrja um sjálva konsertina, sigur Poul seg ikki vera tann rætta at tosa við. Hann vísir til tað, sum áður hevur staðið í Sosialinum um, at talan verður um felagskór, mannað við sangarum úr Betesdakórinum, Siloakórinum, VOX, Ebenezerkórinum, United Voices og Suðuroyar Gospelkóri, sum skal syngja Bill Gaither løg saman við Jessy Dixon. Atgongumerki fáast við dyrnar, og kostnaðurin er 150 krónur fyri vaksin og 75 krónur fyri børn.



*Talan verður um felagskór, sum skal syngja saman við Jessy Dixon*

**Útgávur har Vanja hevur sungið**

1978 Singleplátan "Vanja"
1979 LP'in "Vanja og Miriam - Barnasangir"
1981 LP'in "Miriam, Vanja og Laila"
1985 LP'in "Gospeltónar" Ymisk
1990 Fløgan "Eg eri so spent til jóla" Ymisk
1995 Fløgan "Í góðum lag" Ein uppsamlingsfløga við gomlu sangunum hjá teimum
2003 Fløgan "Vit kunngera Jesus" Ymisk
2003 Fløgan "Ein stjørna lýsti á nátt" Ymisk
2004 Fløgan "So gott at vita" Ymisk

Umframt hetta hevur Vanja gjørt eitt ótal av sangupptøkum í Útvarpi Føroya

løg, góðar tekstir, sá gott út, og tað ger hann enn, hann sær skid gott út tilkomin, viðmerkir hon og flennir, og so syngur hann ótrúliga væl, sum ein dreymur, og eisini so høgt, at tað er lætt at syngja við sum konufólk.

Herfyri sang Vanja á gospeltúrinum við Norrønu. Hvørt kvøld var jamsession, og tað eina kvøldið byrjaði onkur at spæla Europe hittið Carrie. Vanja rann yvir til pallin og segði, eg vil hava hasa mikrofonina, og so sang hon sangin úr enda í annan. Aftan spruttu fleiri av gospelsangarunum og tónleikarunum sum Europe fjepparar, og tey fóru eftir einum fløguspælara og eini Europe fløgu og sótu leingi og sungu við.

Kvøldið eftir var aftur Jam session, og tá sang Vanja: Rock the Night, Carrie og Cherrokee, og tað riggaði ordiliga væl.

Vanja eigur nýggju fløguna hjá Europe, og henni dámar hana ótrúliga væl. Fløgan er nógv tyngri enn fleiri av gomlu fløgunum. Tað hoyrist at upprunaligi gittarleikarin Jon Norum er komin upp í aftur bólkin. Hann fór úr stutt eftir innspælingina av Final Countdown, tí hann og Joey Tempest kláraðu at semjast um tónlistarligu leiðina bólkurin skuldi fara. Joey vildi spæla melodiska rokkin, meðan Jon heldur vildi verða tyngri. Á nýggju fløguni eru teir bæði tungir og supermelodiskir.

Vanja fjasar eitt sindur og er ordiliga takksom, fyri at Sosialurin hevur skipað fyri, at hon sleppur at hitta Europe. Hon sigur, at ,amma hennara bara flenti tá hon hoyrdi, at hon skuldi hitta Europe, og segði "nú skuldi tú verið ein ung lekkur dulla". So nú sleppi eg bara, at eta gularøtur til Europe koma flennir hon ovfarakát.